

Mynd: Harald Pettersen, Statoil

# Ongin gullfepur í Arktis

**Jógvan Hugo Gardar**

25.01.2015 - 13:02

Oljan.fo

Aftaná at oljuprísurin er lækkaður nógv, er hugurin at gera stórar íløgur í oljuframleiðslu í Arktis eisini minkaður. Í øllum førum eru oljufeløgini nú meir varin, og vilja tryggja seg best møguligt í samband við oljuvirksemi í einum øki sum er krevjandi. Millum annað hevur Statoil útsett avgerðina um nær fyritøkan skal seta í gongd við oljuframleiðsluna á Johan Castberg-økinum. Fyribils er avgerðin um nær borast skal á Castberg útsett til í juni í ár.

Sambært Berlingske Business er talan ikki bara um Statoil sum bíðar. Tey flestu oljufeløgini sum hava loyvir í Arktiska økinum sita og bíða og royna at tulka gongdina í oljuprísinum.

Fleiri greinarar eru farnir at seta spurnartekin við um Johan Castberg ber seg fíggjarliga, men Statoil hevur avvíst hesum, og sigur at tey fyribils hava útsett byggingina á Castberg-økinum til í summar.

Tim Dodson, stjóri í Statoil, sigur í samrøðu við Berlingske Business, at Statoil hevur gjørt risaíløgur farnu árini, men oljuleitingin í Arktis hevur ongantíð givið Statoil gullfepur.

Nú vit nærkast februar, so koma eisini rokniskapirnir frá oljufeløgunum sum eru skrásett á keypsskálunum. Tá hesir verða lagdir fram, so verða eisini tøl løgd á borðið sum fara at geva greiðar ábendingar um hvussu stórar íløgur oljufeløgini fara at hava komandi tvey árini. Greinarar hava higartil mett at íløguhugurin er minkandi, og at oljufeløgini fara at gera færri og minni íløgur so leingi oljuprísurin er lágur, og tað er óvissa um hvussu leingi hann verður so lágur.

Greinarar hava rokna seg fram til at á norska landgrunninum fara íløgurnar í nýggj økir og í framleiðsluat minka við millum 15 og 20 prosentum í 2015 og 2016.